# VÆLKOMIN Á GLASIR

# 20

ÁHUGI - FORVITNI
LÆRING - MENNING

# 25

GLASIR

HAR LÆRDÓMUR FESTIR RØTUR

# Góðu tit øll Vælkomin á Glasir

## Góðu næmingar, lærlingar og lesandi á Glasi

Eitt spennandi skúlaár stendur fyri durum. Vit eru spent at taka ímóti tykkum og gleða okkum til tíðina saman við tykkum her á Føroya størsta miðnámsskúla.

"Á Glasi útbúgva og búgva vit tann einstaka fakliga og menniskjaliga. Vit kveikja áhuga og forvitni fyri menning og læring. Hetta er okkara avgerandi leiklutur í samfelagnum."

Soleiðis ljóðar endamálsorðingin hjá Glasi. Alt okkara virksemi snýr seg um at liva upp til hetta, og her eru nógv dugnalig starvfólk, sum vilja hjálpa og stuðla tykkum.

Eg vóni, at tíðin á Glasi fer at vera bæði lærurík og minnisrík. Her fara tit at fáa nýggjar vinir, møta nýggjum avbjóðingum og menna tykkum bæði fakliga og persónliga.

Á Glasi hevur tú bestu karmarnar at læra, og okkara ynski er, at tú gagnnýtir teir til fulnar og verður virkin í bæði undirvísing og øðrum tiltøkum á Glasi. Øll læring er viðkomandi, so lat sinnið upp og legg í vaðið.

Hjartaliga vælkomin á Glasir.



Una Joensen, rektari

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Heilsan frá rektaranum | 1 |
| Eitt livandi umhvørvi | 3 |
| Á Glasi festir lærdómur røtur | 4 |
| Næmingaráðið bjóðar tær vælkomnum | 5 |
| Glasir hevur nógvar tænastur at bjóða | 6 |
| Góð byrjan við KT á Glasi | 7 |
| Nógv spennandi tiltøk | 8 |
| Læring og trivnaður | 9 |
| Tiltøk á Glasi | 10 |
| Virðið okkara skilhaldsreglur | 11 |

# Eitt livandi umhvørvi

2024-2025 var eitt ómetaliga hendingaríkt ár á Glasi. Vit høvdu forkunnuga vitjan úr rúmdini, Shakespeare sjónleik, kommunuvalið og amerikanska forsetavalið, vitjan av vinnuni, árligan ítróttardag og mangt, mangt annað.





















# Á Glasi festir lærdómur røtur



Norrøna fornsøgan sigur, at Glasir var ein viðarlund ella eitt træ uttanfyri Valhøll, sum var vakrast millum gudar og menn. Á Glasi stendur eisini eitt oliventræ mitt í Atrium sum tekin um, at her festir lærdómur røtur, og at okkara næmingar og lærlingar mennast fakliga og menniskjaliga.

# Næmingaráðið bjóðar tær vælkomnum

## Góðu komandi næmingar og lærlingar á Glasi




Fyrst og fremt vilja vit ynskja tær hjartaliga vælkomnum á Glasir! Vit eru glað fyri, at tú hevur valt okkara skúla, Glasir – ein skúli fyri øll. Ígjøgnum tína tíð á Glasi kemur tú at læra teg sjálvan og næmingaráðið nógv betur at kenna. Næmingaráðið á Glasi er mannað av næmingum og lærlingum úr øllum árgangum og leiðum á skúlanum. Næmingaráðið er røddin hjá tær! Næmingaráðið er eitt lið millum næmingin og leiðsluna á Glasi. Í næmingaráðnum leggja vit dent á vælferðina hjá einstaklinginum og felagsskapin sum heild, tvørtur um flokkar, árgangir og leiðir. Eisini vilja vit minna á, at næmingaráðið er ein gyltur møguleiki fyri teg at mennast og læra at taka ábyrgd. Vit gleða okkum at síggja teg her og ynskja tær eina ómetaliga góða tíð á Glasi!

Bestu ynskir

Bjørg Brynhildardóttir Egholm, forkvinna
Halla Herdalur Poulsen, næstforkvinna
Næmingaráðið á Glasi 2024/25

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Glasir hevur nógvar tænastur at bjóða

## Næmingatænastan

Ein lestrarvegleiðari er knýttur at hvørjum flokki og fylgir tær gjøgnum alt skúlaskeiðið. Sum næmingur kanst tú trygt og í trúnaði venda tær til tín lestrarvegleiðara við øllum viðurskiftum.

## Bókasavnið

Bókasavnið er eitt skattkamar av íblástri, ein skapandi snúningsdepil, har tú kanst royna nýggj hugskot, gera verkætlanir og samstarva við aðrar næmingar.

## Kantinan

- Mána- til fríggjadag 07:15-14:15
- Morgunmatur 07:15-10:00
- Døgurðin 11:15-12:30
- Vanlig søla 07:00-14:00

## Lektiukafé

- Hjálp frá lærarum og næmingum
- Ókeypis mat og drekka
- Hugnaligar umstøður, gott huglag
- Møguleiki at hitta aðrar næmingar

**“Man fær fantastiska góða hjálp og ein góðan drekkamunn”**

**“Tá ið man fer frá 02 í fólkaskúlanum og til 12 á C-stigi, so veit man, at lektiukaféin ger mun”**

**“Nú er støddfrøði mítt yndisfak”**

## Lesing og skriving

Er trupult hjá tær at lesa og skriva, kann Lesi- og skrivitænastan geva tær amboð og vegleiðing, sum kan lætta um tína skúlagongd.

# Góð byrjan við KT - hjálp er at heinta

## Innleiðsla

Nógv nýtt er at læra og venja seg við fyrstu tíðina sum nýggjur næmingur á Glasi, ikki minst KT-skipanir og mannagongdir, sum vit brúka her. Men stúr ikki! Vit eru altíð til reiðar at hjálpa og vegleiða tær.

M.a. hava vit gjørt eina síðu, sum vit kalla Góð byrjan, har tú fært hjálp og vegleiðing til nakrar av mest vanligu byrjanaravbjóðingunum innan KT í skúlahøpi á Glasi.

Síðuna brúka tit sum innleiðsla til skúla-KT teir fyrstu dagarnar av skúlaárinum, men hon er eisini góð at brúka seinni at minna teg á, hvussu tú brúkar hesar KT-skipanir.

Leinkið til hesa síðu er:
glasir.fo/godbyrjan

Á glasir.fo/kt eru eisini vegleiðingar og leinki til at heinta KT-amboð og skipanir.



# Góður felagsskapur - ymisk tiltøk

Fyri at gera læringsumhvørvið á Glasi spennandi og fjølbroytt verður skipað fyri ymiskum tiltøkum, ið víkja frá vanligu tímatalvuni, í og uttan fyri skúlatíð. Vit kunnu nevna felagstímar, framsýningar, fyrilestrar, verkætlanir, temadagar, námsferðir, virkis- og stovnsvitjanir.

Á Glasi kann eisini vera ymiskt frítíðarvirksemi, eitt nú innan myndlist, tónleik og teldu. Næmingar hava møtiskyldu til tiltøk, ið eru skipað í skúlatíðini.

## Hungursleikir tiltak á Glasi



Bókasavnið á Glasi og Bókadeildin skipaðu á vári 2025 fyri stórum útgávutiltaki í sambandi við, at nýggjasta bókin í røðini um hungursleikirnar, Sólarris á heystingardegi, kom út á føroyskum samstundis sum upprunaútgávan. Skipað var fyri fyrilestri, upplestri, filmsframsýning og bókasignering.

Á myndini greiðir Sámal Soll frá um dystopi í filmi og bókmentum.

# Læring og trivnaður telefonfrí undirvísing

## Latið skíggjarnar aftur

Vit læra best í einum umhvørvi, har vit trívast og hava tað gott. Glasir er eitt stað, har tað skal vera gott hjá øllum at vera.

Óviðkomandi nýtsla av snildfonum, teldlum og teldum í skúlatíðini kann ávirka læring og trivnað, tí skíggjanýtslan órógvar. Glasir hevur tí telefonfría undirvísing.

Hetta merkir, at telefonir verða lagdar í eitt skáp í tímunum, og brúk av teldu/teldlum í skúlanum verður avmarkað á kervinum, so óviðkomandi nýtsla, sum t.d. stroyming, spøl, shopping og sosialir miðlar, verður sáldað frá.

Haraftrat eru teldurnar afturlatnar, tá tímin byrjar, til undirvísarin hevur givið loyvi at lata tær upp.

Les meira um hetta á hesum QR-leinki.



# Førleikar at megna avbjóðingar

Vit ynskja, at tú ognar tær fakligar førleikar, umframt fært styrki og sjálvsálit til at megna avbjóðingar í lívinum við vísdómi. Saman við lærarum og øllum starvsfólkum skúlans leggur Nærningatænastan alla orku í at stuðla tær í útbúgvingartíðarskeiðnum.

Næmingatænastan er ein samansettur bólkur av eldhugaðum fólkum. Har eru lestrarvegleiðarar, orðblindalærarar, audiologopedar, bókavørðar - øll við sama endamáli - at hjálpa tær á tíni ferð.

Hetta merkir, at umframt dagligu undirvísingina ber til at fáa serfakligan stuðul, vegleiðing og hjálp frá toyminum í Næmingatænastuni.

Fyri at lætta um hjá tær er ein hurð at fara til, har allur stuðul verður samskipaður. Hevur tú brúk fyri stuðli, hjálp og vegleiðing til viðurskifti, ið ávirka skúlagongdina, herundir persónlig, sosial, fíggjarlig ella faklig viðurskifti v.m., kanst tú fara til lestrarvegleiðaran.

Vit fegnast um at hava teg sum næming á Glasi og gleða okkum til at fylgja tær á tíni ferð við bæði sigrum og avbjóðingum. Saman stremba vit eftir, at útbúgvingartíðin verður hugkveikjandi, virkin og áhugaverd.



# Virðið okkara skilhaldsreglur

Á Glasi hava vit lestrar- og skilhalds-reglur, sum eru settar í gildi fyri at geva øllum góðar umstøður at virka undir.

Skilhaldsreglurnar áseta mannagongdir fyri skilagóða atferð. Reglurnar lýsa mannagongdir skúlans og skyldurnar hjá næmingum og lærlingum við uppmøting, innlating og skilhaldi sum heild. Allir næmingar og lærlingar hava skyldu til at seta seg inn í hesar reglur og fylgja teimum.

Vit leggja stóran dent á at fara væl um okkara skúla. Tí rudda vit upp eftir okkum. Matur og borðbúnaður hoyrir bert heima í kantinuni. Vit rudda alt burtur eftir máltíðir. Vit halda skúlastovur og felagsøki ruddilig.

Alt hetta er lýst stutt og greitt í okkara skilhaldsreglum, sum er á hesum QR-leinki.

**LAT OKKUM BASA HESUM**





*"Tað er læruríkt at ganga á Glasi. Lærararnir møta tær har, ið tú ert. Teir skilja, at allir næmingar ikki eru eins. Komandi næmingar á Glasi skulu gleða seg til nøkur lærurík ár við góðum sosialum samanhaldi."*

***Eydna Daryanti Hjalt, búskaparbreyt***



*"Eg havi valt smiðju- og maskinbreytina. Mær dámar sera væl prosessina við at skapa nakað. Serliga tá vit fáa eina uppgávu, har vit sjálvi sniðgeva í einum tekniprogrammi og síðani sleppa at gera tað."*

***Benjamin Solberg, smiðju- og maskinbreyt***



*"Vit læra nógv annað enn bert hár. T.d. gera vit negl, lita, rætta vippur og brýr. At leggja makeup og gera negl og hár á hvørjum øðrum er serliga gott fyri samanhaldið."*

***Agnes Amalia Danielsen, hárbreyt***



*"Hugbreyt er ein øgiliga mennandi breyt. Vit læra sera nógv um heimin. Tað er mennandi at læra nýggj mál, tí tú fært eitt betri innlit í aðrar mentanir. Eisini lærir ein nógv um bókmentasøgu, sum eisini er áhugaverd."*

***Beinta Fjallsbak, hugbreyt***

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

GLASIR

TÓRSHAVN COLLEGE